# Brynja seg til hópuppsagnir í Suðuroynni

**ELDRARØKT Leiðslan á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi er nú farin at fyrireika seg til at siga 10-15 fólkum úr starvi fyri at fáa kabalina hjá Rósu Samuelsen at ganga upp**

Áki Bertholdsen

Vissi Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, ikki ger eina brádliga kúvending fyrsta dagin, fáa eini 10-15 starvsfólk á Suðuroyar Ellis- og Røktatheimi hoyringsskriv um uppsøgn í allar nærmastu framtíð.

Tað Staðfestir Ronnie Midjord, stjóri á Suðuroyar Sjúkrahúsi og ellis- og røktarheiminum, eftir at umboð fyri Nærverkið vóru á fundi við leiðsluna og stýrið fyri Suðuroyar Ellis og Røktarheim á Tvøroyri í fyrradagin.

Rósa Samuelsen hevur boðað frá, at tey átta tvímannakømrini á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi skulu niðurleggjast, tí hon heldur at tað er óvirðiligt, at tvey gomul fólk, sum annars onki samband hava sínamillum, skulu tvingast at búgva saman.

Sostatt hevur hon tikið avgerð um, at so hvørt, sum eitt fólk fellur á hesum tvímannakømrunum fellur frá, skulu nýggj búfólk ikki takast inn.

Og hóast nógv mótmæli bæði frá Vágs Býráði og frá samgongufeløgunum í Javnaðarflokkinum, bendir alt á, at hon stendur við hesa ætlan.

Mánadagin vóru umboð fyri Nærverkið tískil í Suðuroy á fundi um at seta ætlanina í verk.

Ein avleiðing av hesum er, at 10 ársverk á Suðuroyar ellis- og røktarheimi, hvørva fyri at laga starvsfólkatalið til tað fellandi talið á búfólkum.

Men av tí, at tey allarflestu arbeiða parttíð, verður talan um upp ímóti 15 fólkum, sum verða uppsøgd av hesi orsøk.

Kortini er tann ventilurin í, at umboðini fyri Nærverki skuldi forhoyra seg hjá landsstýriskvinnuni einaferð afturat fyri at vita um hon ætlanin stendur við.

– So skjótt vit frætta aftur, fara vit at gera eftir teimum boðum, vit fáa, staðfestir Ronnie Midjord.

– Verður ætlanin slept, hendir ikki meiri

Men hann staðfestir eisini, at stendur ætlanin við, ræður um at bera skjótt at fyri at røkka ætlaðu sparingunum, tí nógv starvsfólk hava seks mánaða uppsagnartíð.

– So mugu vit sum skjótast undir tilgongdina at sita fólkinum upp, leggur hann afturat.

Hann sigur, at tað er er neyðugt, tí tað er ásett, hetta tiltakið skal føra eina sparing upp á 2,7 milliónir við sær á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi næsta ár.

Og fyri at tað skal eydnast at fremja tað sparingina, er tað longu í seinna lagi at fara undir eina uppsagnartilgond, tí summi hava so langa uppsagnartíð.

*aki@sosialurin.fo*

## *Hava svikið lyftini*

Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, heldur fast um, at ger Rósa Samuelsen álvara av at niðurleggja átta pláss á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, hevur samgongan svikið sítt lyfti til tær fýra kommunurnar í Suðuroyar sýðru helvt, sum hava spent seg út fyri at byggja ellis- og røktarheim Vági. Hon sigur, at tá ið farið varð undir nýggja heimið í Vági, var grundarlagið, at talan skuldi vera um nýggj búpláss og nýggj størv.
Men skulu átta pláss niðurleggjast á Tvøroyri og 10-15 fólk sigast upp á Tvøroyri, er ikki talan um nýggja arbeiðspláss og nýggj búpláss.
Hon endurtók fyri Rás2 í gjár, at góðtekur flokkur hennara í samgonguni, Javnaðarflokkurin, fer hon at umhugsa støðu sína í flokkinum

# Rósa Samuelsen



**SPARINGAR Vil landsstýriskvinnan í almannamálum ikki sleppa ætlanini at niðurleggja átta búpláss á Suðuroyar ellis og røktarheimi, ætlar Javnaðarflokkurin at blokera fyri øllum sparitiltøkum á almannaøkinum**

Áki Bertholdsen

Tað er blivið rættiliga ísakalt ímillum samgongufelagarnar Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum og Hans Paula Strøm, talsmann hjá Javnaðarflokkinum í almanna- og heilsumálum.

Og vil landsstýriskvinnan ikki bakka, hóttir Hans Pauli við, at so fer Javnaðarflokkurin at leggja hana á ís.

Tað er ætlanin hjá Rósu Samuelsen at niðurleggja átta búpláss á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi sum hevur fingið eina kuldabrúgv at leggja seg ímillum landsstýriskvinnuna og Javnaðarflokkin.

Javnaðarflokkurin vil ikki vita av hesi ætlan og hevur kravt, at Rósa Samuelsen tekur hana aftur.

Men tað hevur hon ikki viljað og so seint sum mánadagin var Nærverkið á fundi við Suðuroyar Ellis og røktarheim um at seta ætlanina í verk.

### Leggjast á ís

Rósa Samuelsen hevur ført fram, at tá ið fíggjarkarmurin fyri næsta ár varð samtyktur, gjørdist tað greitt, at almannaverkið skal spara 18 milliónir.

Tað hevur Javnaðarflokkurin onki ímóti og Hans Pauli Strøm segði við Rás2 í gjár, at flokkurin er sinnaður at samstarva við landsstýriskvinnuna um eina loysn.

Men flokkurin vil, at pappírið skal vera blankt, tá ið hesar tingingarnar verða tiknar upp við Rósu Samuelsen.

Tað, sum flokkurin krevur, er, at allar sparingarnar verða viðgjørdar undir einum og at ein loysn verður funnin, sum ber í sær, at ongi búpláss á ellis og røktarheimum verða niðurløgd.

Men Hans Pauli Strøm segði eisini við Rás2, at enn hevur tað ikki eydnast at fáa landsstýriskvinnuna á tal í hesum máli.

Hinvegin ger hann eisini greitt, at ber tað ikki til at fáa eitt samstarv ílag við landsstýriskvinnuna um hetta málið, fer tað samstundis at bera illa til at samstarva um aðrar sparingar.

**» Ber ikki til at samstarva við landsstýriskvinnuna um hetta málið, fer tað at bera illa til at samstarva um aðrar sparingar**

– Formliga kunnu vit ikki blokera fyri ætlanini hjá Rósu Samuelsen, tí hetta er ein fyrisitingarlig avgerð, sum hon hevur heimild at taka einsamøll, uttan at spyrja nakran eftir.

– Men politiskt kunnu vit treyta okkum, at eitt samstarv um hetta málið er ein neyðug fortreyt fyri at samstarva um øll møgulig onnur mál, sum almannamálið skal hava ígjøgnum, sigur hann.

Hann leggur afturat, at ber tað ikki til hjá samgonguni at samstarva um hetta málið, ber eisini illa til at samarbeiða um nakað sum helst.

– Tí haldi eg, at tað liggur í kortunum, at vit noyðast at finna eina loysn, sum vit kunnu semjast um, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*